tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 30.03.2022 kl. 16:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur: [redacted]

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 16/22 | 22/00013-2 | Fyrispurningur um leigu av høli hjá Tvøroyrar kommunu |
| 17/22 | 22/00133-2 | Umsókn um innrætting av Koldepotinum við havnalagið, Føroya Bjór |
| 18/22 | 21/00428-2 | Skúlagarðar -dagføringar 2021 av leikum v.m |
| 19/22 | 22/00120-1 | Fráfaringaraldur hjá starvsfólkum í Tvøroyrar kommunu |
| 20/22 | 22/00156-1 | Tilflytarar/flóttafólk -Fólk sum flyta til Tvøroyrar kommunu orsakað av ófriði/kríggi |
| 21/22 | 21/00382-2 | Posta -Leigusáttmáli um avgreiðslubyggning matr.nr. 374 í miðbýnum (Posta-bygningurin) |
| 22/22 | 22/00190-2 | IRF -Ársaðalfundur 2022 |
| 23/22 | [redacted] | [redacted] |
| **Til kunningar** | | |
| 6/22 | 22/00096-1 | Skattatøl 2022 |
| 7/22 | 22/00124-2 | Tvøroyrar skjalasavn -fyrisp. um hølið til starvsfólk (Konservator) |
| 8/22 | 22/00174-2 | SALT -áheita á nevndina fyri Saltsilogrunnin at viðka stýrið til 5 limir |

| | | |
|---|---|---|
| 9/22 | [redacted] | [redacted] |
| 10/22 | [redacted] | [redacted] |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur upp skránna og kunnar um, at mál nr. *16/22 "Fyrispurningur um leigu av høli hjá Tvøroyrar kommunu"* og nr. 17/22 *"Umsókn um innrætting av Koldepotinum við havnalagið, Føroya Bjór"* vera tikin av skrá vegna nýggjar upplýsingar og broyttar umstøður. Hesi mál vera ístaðin beind aftur til nýggja viðgerð í Teknisku nevnd. Einmælt samtykt.

Kristin Michelsen spyr um viðmerkingar eru til skránna.

Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt, at hon tekur ikki undir við skránni, tí at málið «val av stýrislimum til Bú- og heimatænastuna BHS» ikki er á skrá, og ynskir hon at hetta málið verður sett á skrá, har umboðini vera vald samb. lutfalsvalhóttunum.
Súsanna Bertholdsen ynskir mál á skrá, har kunna verður um virksemið hjá Bú- og Heimatænastuni BHS.
Súsanna Bertholdsen ynskir mál á skrá um 100 ára føðingardagin hjá Fiskepigernes fagforening

Kristin Michelsen upplýsir, at málið «val av stýrislimum í Bú- og heimatænastuna BHS» er avgreitt av Tvøroyrar býráð, við 3 viðgerðum og samtyktum hin 4. januar 2021, 1. mars 2021 og 3. februar 2022. Kristin Michelsen metur sostatt, at málið er avgreitt av Tvøroyrar býráð.

Kristin Michelsen kunnar um at málið við. kunning um virksemið í BHS, er stýrið í einari tilgongd at seta nýggja leiðara, nú Anna Djurhuus fer frá fyri aldur. Kristin Michelsen vil heita á nýggja leiðaran um at kunna um virksemið og ætlanir í Bú- og heimatænastuni, skjótast eftir at viðkomandi er settur í starv.

Kristin Michelsen kunnar um at málið viðv. 100 ára føðingardagin hjá Fiskepigernes fagforening, er hetta mál viðgjørt av mentanarnevndini, og hevur umsitingin verði við til at samskipa hátíðardagin. Kristin Michelsen mælir til at málið verður beint í fíggjarnevndina til nýggja viðgerð.

Til støðutakan

## 16/22
## 22/00013-2 Fyrispurningur um leigu av høli hjá Tvøroyrar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.01.2022 | 4/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 31.01.2022 | 3/22 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.03.2022 | 19/22 |
| 4 Fíggjarnevndin | 17.02.2022 | 24/22 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.03.2022 | 28/22 |
| 6 Býráðið | 30.03.2022 | 16/22 |

**Málslýsing:**
Fyritøkan Sp/f Júma hevur sent fyrispurning við telduposti til Tvøroyrar kommunu, um leigu av høli á havnaøkinum.
Hølið skal brúkast til millum lagur/goymslu av takpap og parvís arbeiðsøkið. Fyritøkan hevur júst gjørt avtalu við takpap framleiðaran Derbigum. Fyritøkan ynskir at lagur verður undir taki og liggur á havnaøkinum, har góður møguleikar eru fyri flutningi, til og frá lagrinum.
Fyritøkan hevur spurt um at lána ein part, av einum av rúmunum í "Kuldepotinum", umleið 100m2

**Lógargrundarlag:**
Leigureglur fyri ognir hjá Tvøroyrar kommunu

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Inntøka frá leiguøkið

**Tilmælið:**
Við hesum verður málið latið teknisku nevnd og møguliga fíggjarnevndini til støðutakan.

**Tekniska nevnd 10. januar 2022:**
Einmælt samtykt at geva lov til at leiga høli til Sp/f Júma, treyta at høli ikki skal brúkast til annað.
Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Tilmæli til fíggjarnevndina - LJ:**
Fíggjarnevndin hevur 27. september 2021 samtykt at leiga matr.nr. 497b (vestari lón av Koldepotinum) til Føroya Bjór, samb umsókn og leigusáttmála.
Í løtuni er Dugni og verkætlanin Pakkhús 18 í eystara lónini – matr. nr. 495.

Tvs.at hølið talan kann vera um, er lónina í miðjuni, matr. nr. 497a.
Kommunan hevur longu eina fyrispurning um leigu ella keyp av høli, frá Groth Electric, dagf. 16-04-2021, (mál: 21/00388) og hann hevur ikki fingið nakað endaligt svar enn.

Ynskir fíggjarnevndin at matr. nr. 497a verður leigað út, annaðhvørt sum eitt ella fleiri leigumál?

**Fíggjarnevndin 31. januar 2022:**
Einmælt samtykt at heita á tekniskudeild um at kanna hvørt kommunan sjálv hevur tørv á hølunum.

**Tekniska nevnd 07. marts 2022:**
Nevndin hevur einmælt samtykt at tekniska deild og rakstrartoymi fær ráðarættin yvir verandi hølum í Kuldepotinum, tvey tey uttasti hølini.
Málið verður við hesum latið fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2022:**
Einmælt samtykt at Tekniska deild fær innivist og ræðisrættin av mið- og eystarilon av Koldepotinum, matr. nr. 497a og 495.
Einmælt samtykt ikki útleiga Koldepotið, vísandi til at Koldepotið verður at hýsa Teknisku deild.

**Kommunustjórin 24.03.2022**
At viðgerða og taka støðu til er tilmælið hjá Fíggjarnevndini 17. mars 2022, ikki at útleiga annað en vestari lon í Koldepotinum matr. nr. 497b, har leigusáttmáli longu er samtyktur. Og geva Tekniskudeild hjá Tvøroyrar kommunu ráðarættin yvir mið- og eystari lon av Koldepotinum ávikavist matr. nr. 497a og 495.

**Býráðið 30. marts 2022:**
Málið er tikið av skrá.

**17/22**

**22/00133-2 Umsókn um innrætting av Koldepotinum við havnalagið, Føroya Bjór**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.03.2022 | 18/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.03.2022 | 27/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.02.2022 | 23/22 |
| 4 Býráðið | 30.03.2022 | 17/22 |

**Málslýsing:**
Umsókn er komin frá Føroya Bjór um at sleppa at innrætta hølið, tey leiga frá kommununi á matr. nr. 497b.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at geva loyvi, so skjótt umsóknartilfarið er fullfíggjað.
Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. marts 2022:**
Einmælt samtykt at taka undir við at geva byggiloyvi, tá neyðugu skjølini fyriliggja. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2022:**
Einmælt samtykt, at heimila Føroya Bjór at fremja tillagingar uttanveggja av Koldepotinum ísamráð við Teknisku deild.

**Býráðið 30. marts 2022:**
Málið er tikið av skrá.

**18/22**

**21/00428-2 Skúlagarðar -dagføringar 2021 av leikum v.m**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 11.05.2021 | 33/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.05.2021 | 34/21 |
| 3 Býráðið | 27.05.2021 | 37/21 |
| 4 Mentanarnevndin | 14.09.2021 | 71/21 |
| 5 Mentanarnevndin | 12.10.2021 | 74/21 |
| 6 Mentanarnevndin | 09.11.2021 | 101/21 |
| 7 Mentanarnevndin | 08.02.2022 | 5/22 |
| 8 Mentanarnevndin | 08.03.2022 | 15/22 |
| 9 Fíggjarnevndin | 17.03.2022 | 26/22 |
| 10 Býráðið | 30.03.2022 | 18/22 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 07.05.2021)**
Tekniskadeild hevur arbeitt við uppskoti til dagføring av skúlagarðinum í Trongisvági og á Tvøroyri. Avsett eru kr. 250.000,- til dagføringar á FÆ2021.

**Mentanarnevndin 11. maj 2021:**
Einmælt samtykt at dagføra skúlgarðin við Tvøroyrar skúla fyri kr. 250.000,- og skúlagarðin í Trongisvágs skúla fyri kr. 250.000,-, og keypið av leikum verður í samráð við mentanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. maj 2021:**
Einmælt samtykt

**Býráðið 27. maj 2021:**
Einmælt samtykt at samlaða játtanin á FÆ20 á kr. 500.000,- til dagføring av báðum skúlagarðinum. Tekniska deild umsitur játtanina í samráð við skúlaleiðsluna

**Mentanarnevndin 14. september 2021:**
Málið verður tikið uppá á einum seinni fundi

**Kommunustjórin 10. Oktober 2021:**
Forkv. í mentanarnevndini Anita Vibergsdóttir, ynskir at Tekninska deild møtur á fundinum at kunna um status og gongdina í málinum.

**Mentanarnevndin 12. oktober 2021:**
Tekniskileiðarin, Linn Augustinussen greiddi frá at vøran var bíløgd, men at henda enn er ikki komin til Føroyar. Ástaðarfundur hevur verði við veitaran Innsport 23. september. LA veit ikki uppá núverandi tíðspunkt nær arbeiði at uppseta verður.

**Kommunustjórin 04.11.2021**
Mentanarnevndin ynskir at fáa at vita status á málinum.

**Mentanarnevndin 09. november 2021:**
Málið var kunna

**Mentanarnevndin 08. februar 2022:**
Einmælt samtykt, at heita á tekniska leiðaran um at senda nevndarlimunum kunning.

**Kommunustjórin 01.03.2022**
Leiðarin av Tekniskudeild ger vart við, at avbjóðingar hava verði við veitingini av leikum, ið ætlanin skuldi fíggjast av FÆ2021. Hesar eru ikki allar leveraðar í 2021, og verður tí neyðugt at fíggja part av hesum av FÆ2022.

- Samtykt var at fremja dagføringar á skúlagarðin í Trongisvági fyri tkr. 319
- Levera og goldið er í FÆ2021, 50% svarandi til tkr. -160
- Eftir at gjalda í 2022 (Má fíggjast av av FÆ2022) tkr. 159
- Eftir at fíggja í 2022 tkr. 159

**Íløga skúlagarð FÆ2022, §411 tkr. 100**

Til støðutakan hjá Mentanarnevndini er fígging av meirkostnaði av skúlagarðinum FÆ2022, §411.

**Mentanarnevndin 08. marts 2022:**
Linn Augustinussen var á fundinum og greiddi frá at arbeiði er í gongd, og at neyðugt verður at veita eina eykajáttan á tkr. 100.
Einmælt samtykt at veita eykajáttan á tkr. 100, og hetta verður játta av §411.
Einmælt samtykt at reiggja til rørslutarnað verður keypt beinanvegin, játtan á tkr. 150 er avsett á §411.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2022:**
Einmælt samtykt at seta arbeiði í gongd og verður hetta játta av §411.

**Kommunustjórin 18.03.2022**
Tekniska deild ger vart við 18.03.2022 at, tørvur verður á fallundirlagi undir reiggjustativinum.

Kostnaðarmeting, Tekniska deild metir hesa vera áleið 75.000,- u/mvg, uttan at hava fingið tilboð uppá sjálva arbeiði.

Mælt verður til at figgja fallundirlag og keyp av reiggjustativ til rørslutarnað við flytan millum játtan á §411 «Íøga til skúlan»

Játtan FÆ2022, §411 dagføring av skúlagarðinum í Trongisvági:
Játtan í alt: kr. 100.000,-

| | |
|---|---|
| **Tilmælið um játtan:** | **Kr. 225.000,-** |
| *Reiggja til rørslutarnað:* | *kr. 150.000,-* |
| *Fallundirlag:* | *kr. 75.000,-* |

**Býráðið 30. marts 2022:**
Einmælt samtykt at veita eykajáttan av §411 samb. tilmælið hjá kommunustjóranum og fríggjarnevndini.

**19/22**
**22/00120-1 Fráfaringaraldur hjá starvsfólkum í Tvøroyrar kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.03.2022 | 36/22 |
| 2 Býráðið | 30.03.2022 | 19/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 27. Februar 2022**
Kristin Michelsen, borgarstjóri ynskir, at Tvøroyrar kommuna viðgerð og endurskoðar fráfaringaraldurin hjá starvsfólkum, ið starvast hjá Tvøroyrar kommunu.

Kristin Michelsen vísir á, at Tórshavnar kommuna hevur samtykt einmælt at avtaka fráfaringaraldurin, sum í praksis merkir, at starvsfólk kunnu halda fram, so leingi tey megna tað. Avgerandi er, at aldur ikki longur er eitt sakligt atlit fyri uppsøgn, men at førleiki heldur enn aldur skal avgera, nær farið verður av arbeiðsmarknaðinum. Aldur skal ongantíð vera avgerandi fyri, nær starvsfólk fara av arbeiðsmarknaðinum, tí ongin skal vera fyri mismuni av aldri. Vit eiga eisini at taka atlit til stóra starvsfólkatrotið, sum er á arbeiðsmarknaðinum, og hava tørv á mongum teirra, sum eru væl fyri, á fleiri arbeiðsøkjum.

Hetta kemur at merkja, at kommunan má skapa ein rúmligan arbeiðsmarknað fyri eldri starvsfólk.

Kristin Michelsen, ynskir at Tvøroyrar býráð tekur støðu til hetta prinsipiella máli, um ikki at diskriminerar starvsfólk á almenna arbeiðsmarknaðinum, ella vegna teirra aldur.

Fráfaringaraldurin hjá Tvøroyrar kommunu er í dag 67 ár. Tó hava øll starvsfólk møguleika at søkja um at vera í starvi, til tey eru 70 ár.

**Lógargrundarlag: Rundskriv nr. 9001 frá 1. apríl 2013 um fráfaringaraldur**

- *§ 1. Fráfaringaraldurin hjá sáttmálasettum almennum starvsfólki verður framhaldandi sum høvuðsregla 70 ár.*
- *§ 2. Tað áliggur almenna arbeiðsgevaranum at siga alment settum starvsfólki upp í so góðari tíð, at tey kunnu fara úr starvi við endan á tí manaði, tey fylla 70 ár.*
- *§ 3. Arbeiðsgevarar kunnu tó velja at leingja setanina, eftir at starvsfólk hava fylt 70 ár. Tað verður gjørt við at seta starvsfólkið í eitt upp í tvey ára tíðaravmarkað starv.*
- *§ 4. Leingjan eftir § 3 kann verða gjørd fleiri ferðir.*

Starvsfólkaskipan hjá Tvøroyrar kommunu

*8. Fráfaringaraldur*
*Fráfaringaraldurin fyri starvsfólk hjá Tvøroyrar kommunu er 67 ár. Tó hava øll starvsfólk møguleika at søkja um at vera í starvi, til tey eru 70 ár.*

**Fíggjarligar avleiðingar:** Ókent

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu, verður við hesum málið lagt fyri fíggjarnevndina og møguliga býráðnum til støðutakan

**Fíggjarnevndin 17. marts 2022:**
Einmælt samtykt at heita á umsitingina um at kanna hvørja støðu kommunufelagið og kommur hava til hetta mál.

**Býráðið 30. marts 2022:**
Kristin Michelsen mælir til, at fráfaringaraldurin hjá øllum starvsfólkum, ið starvast hjá Tvøroyrar kommunu verður broyttur frá verandi 70 ár til ístaðin vera 72 ár. Hetta soleiðis at øll starvsfólk hjá Tvøroyrar kommunu, fáa møguleikan at søkja um at vera í starvi, til tey eru 72 ár. Einmælt samtykt.

**20/22**
**22/00156-1 Tilflytarar/flóttafólk -Fólk sum flyta til Tvøroyrar kommunu orsakað av ófriði/kríggi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.03.2022 | 35/22 |
| 2 Býráðið | 30.03.2022 | 20/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 15.03.2022**
Mælt verður til, at Tvøroyrar kommuna tekur støðu til og hevur eina ætlan/ flóttafólka-tilbúgving fyri, hvussu handfaringin av, og hvørji tilboð og tænastur Tvøroyrar kommuna ynskir og kann bjóða tilflytarum/flóttafólkum, sum flyta til Tvøroyrar kommunu orsakað av ófriði/kríggi í styttri ella longri tíðarskeiðir.

Viðv. møguligum tilflytarum úr Ukraina, er talan um eina serstøðu, har mælt verður til at umsitingin saman við Borgarstjórin fær heimild frá býráðnum til at taka avgerðir, sum ikki tola at bíða viðv. tilflytarum úr Ukraina.

Givið er, at um fleiri tilflytarar flyta til Tvøroyrar kommunu, vil hetta viðføra eitt ávíst eyka trýst á tær kommunalu tænasturnar so sum barnaansing-, skúla- og heilsuøkið. Tvøroyrar kommuna má hava eina ætlan fyri integratión, frálæru í føroyskum og møguliga hýsing av fólki, sum eru flýdd úr Ukraina, samt geva teimum javnbjóðis atgongd til tænastuveitingar.

**Lógargrundarlag: Kommunufulltrúin**
*Útlendingamál er ríkismál, og tað er danska Udlændingestyrelsen og Styrelsen for International Rekruttering og Integration, ið tekur avgerðir um at veita útlendingum arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum.*

*Udlændingestyrelsen og SIRI har grundet krigen i Ukraine lavet informationsside med spørgsmål og svar målrettet personer fra Ukraine, der ønsker at opholde sig i Danmark eller er i Danmark.*

*Viðkomandi leinkjur:*
- *nyidanmark.dk*
- *siri.dk*

**Fíggjarligar avleiðingar: Ókent**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2022:**
Einmælt samtykt, at málið verður viðgjørt á einum seinnum fundi, eftir at løgtingið hevur samtykt lóg á økinum.

**Býráðið 30. marts 2022:**

Kristin Michelsen mælir til at borgarstjórin saman við umsitingin fær heimild frá býráðnum at taka avgerðir, viðv. tilflytarum úr Ukraina, soleiðis at tilflytarar úr Ukraina fáa javnbjóðis tilboð at gera brúk av tænastum, sum Tvøroyrar kommuna annars veitir øllum borgarum í kommununi.

**21/22**
**21/00382-2 Posta -Leigusáttmáli um avgreiðslubyggning matr.nr. 374 í miðbýnum (Posta-bygningurin)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.04.2021 | 16/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.06.2021 | 8/21 |
| 3 Býráðið | 16.06.2021 | 14/21 |
| 4 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 69/21 |
| 5 Býráðið | 28.10.2021 | 66/21 |
| 6 Fíggjarnevndin | 21.12.2021 | 95/21 |
| 7 Býráðið | 21.12.2021 | 90/21 |
| 8 Býráðið | 30.03.2022 | 21/22 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 13.04.2021)**
Posta –Janus Rasmussen- hevur vent seg til kommunustjóran, við ynskið um fund 12. Apríl, at viðgera leigusáttmálan millum Tvøroyrar kommunu og Posta av avgreiðsluhølinum á Sjógøtu 2.

Posta hevur leiga frá Tvøroyrar kommunu í árini 2019 og 2020 alla niðari hæddina, men ynskir frá 2021 at minka um leigumálið, frá 225m$^2$ til 173,5m$^2$. Tvs. at avgreiðsluhøli ikki verður partur av leigumálinum.

Kommunustjórin mælir til at ganga umsókníni á møti, og at nýggjur leigusáttmáli verður gjørdur millum Tvøroyrar kommunu og Posta, galdandi frá 01.01.2021. -Hetta tó treyta av, at leigugjøld fyri 2019 og 2020 fyrst verða avgreidd.

**Fíggjarnevndin 22. april 2021:**
Einmælt samtykt at takan undir við uppskotinum at leiga Posta 173,M$^2$, tó treya av øll eftirstøða fyri árini 2019 og 2020 er goldin

**Fíggjarnevndin 14. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Býráðið 16. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað –Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá umsitingini.

**Kommunustjórin 20 juli 2021:**
Posta og umsitingin hjá Tvøroyrar kommunu hava ikki verði samd um hvussu gjaldast skal fyri el og hita árini 2019 og 2020, har í sáttmálanum er ásett, at leigarin rindar umframt leigugjald fyri el og hita.

Posta hevur hildi hesar útreiðslur fram til 2019, tá Posta var einsamalt í bygninginum. Men tá Posta flytur úr ovari hæddini, -og eftir at eftirskúlin byrjar sítt virksemið í bygninginum-, metur Posta tað ikki vera rætt, at Posta ber allan kostnaðin av el og hita fyri árini 2019 og 2020.

Umsitingin mælir til semju, har Tvøroyrar kommuna og Posta bera ½ av kostnaðinum fyri el og hita fyri árini 2019 og 2020, og at Posta pr. 1. januar 2021 ber kostnaðin fyri el og hita samsvarandi við ferðmetrarnir, sum Posta leigar lutfallið 171/283 lutfalli av samlaða leigu vídd m2, ið verður uppgjørt árliga, samsvarandi galdandi og dagførdan leigusáttmála millum Tvøroyrar kommunu og Posta av Sjógøtu 2.

**Kommunustjórin 21. Okt. 2021.**
Eftir nógv samskiftið við Posta, har umsitingin hjá Tvøroyrar kommunu og leiðslan hjá Posta vóru komin ásamt um, hvussu Posta kann innrætta seg í bygninginum á Sjógøtu 2, nú stóra avgreiðslu hølini ikki longur ynskjast at vera leiga av Posta.

Nýggir leigusáttmáli er gjørdur, har hædd verður tikið fyri gjald av el og hita í lutfallið við fermetrarnir leiga verður. Og partarnir eru samdur um útreiðslurnar fyri el og hita árini 2019 og 2020, vera deildar 50/50 millum Posta og TVK.

Kortini vil stjórin á Posta ikki gjalda leigu av avgreiðsluhølini longur enn til 1. Januar 2021, og hevur broytt leigusáttmálan samsvarandi. (Posta hevur annars virka í allari niðari hæddina á Sjóðgøtu 2, fram til 1. Sep. 2021, tá Posta flutti úr avgreiðsluhølinum )

At taka støðu til hjá fíggjarnevndini er um nýggi leigusáttmálin við Posta skal vera galdandi frá:

- 1. Januar 2021
  1. Aug. 2021

**<u>Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:</u>**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt, at verandi sáttmálin við POSTA skal vera at byrja frá 1. aug. 2021. Um Posta ikki góðtekur hesa áseting innan 30. november 2021, verður Posta uppsagt pr. 1. januar 2022

**<u>Býráðið 28. oktober 2021:</u>**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**<u>Kommunustjórin 03.12.2021</u>**
Staðfest er d.d. at Posta <u>ikki</u> hevur góðtikið leigusáttmálan av Sjógøtu 2. -Kommunustjórin hevur sent stjóranum á Posta áminning 22.11.2021 um at góðkenna og undirskriva leigusáttmálan. Stjórin á Posta Joel undir Leitinum svarar 22.11.2021, at hann ikki góðtekur leigusáttmálan.

Ósemjan er um nýggja leigumálið skal byrja 1. Januar 2021 ella 1. August 2021.

Posta heldur uppá at nýggja leigumálið skal byrja 1. Januar meðan Tvøroyrar kommuna heldur uppá at nýggja leigumálið skal byrja 1. August 2021.

Munurin á hesum dagfesting er tann, at Posta hevur frammanundan leigusáttmála við TVK, har Posta hevur leiga alla niðari hæddina á Sjógøtu 2. Men Posta hevur vent seg til Tvøroyrar kommunu fyri at fáa

avslag í leigu prísinum, og ynskið um at flyta út úr avgreiðsluhølinum, og fáa loyvið til at innrætta seg øðrvísi á minni ferðmetrum.

Hetta hevur TVK loyvt og játta Posta at gera, og er leiguprísurin farin frá kr. 825,-/m2 til kr. 600,-/m2. Eisini hevur Posta fingið loyvið til at innrætta seg á minni ferðmetrum, og at broyta smávegis uppá bygningin.

Men við tað at Posta ikki er flutt út úr avgreiðsluhølinum fyrr enn í sep. 2021, metur TVK, at Posta skal rinda leigu fyri brúk av avgreiðsluhølinum fram til 1. Aug. 2021. Avgreiðsluhølið er uml. 75m2 til støddar og leigugjaldið fyri hetta (jan.-aug.) 8. Mnd. er (600x75x8/12) kr. 30.000,-

**Til støðutakan er:**

1. Um at halda fast við at uppsiga leigusáttmálan við Posta av Sjógøtu 2 pr. 31. Desember 2021 orsakað av at Posta ikki vil góðtaka dagfestingina á leigusáttmálanum.
2. Samráðast um eina semja har Posta og Tvøroyrar kommunu t.d. deila 50/50 leigugjaldið á kr. 30.000,-, ið er gjald fyri leigu av avgreiðsluhølinum í 8. mnd. av 2021.

**<u>Fíggjarnevndin 21. december 2021:</u>**
Einmælt samtykt at halda fast við at uppsiga leigusáttmálan við Posta av Sjógøtu 2 pr. 31. desember 2021 um eftirstøðan fyri avgreiðsluhølini ikki er goldin innan 31.12.2021.

**<u>Býráðið 21. december 2021:</u>**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini.

**<u>Kommunustjórin 22.03.2022</u>**
Umsitingin hevur mótið teldupost frá Stjóranum í Posta, sum kunnar at:

- *Posta ætlar sær í onnur høli á Tvøroyri. Hesi hølir verða væntandi tøk í maj mánaði 2022, og vil tað siga at Posta tá væntar at vera úti úr verandi hølum hjá Tvøroyrar kommunu.*
  *Vónandi er hetta í lagi soleiðis at Posta og Tvøroyrar Kommuna tá ikki hava nakað millumverandi.*
  *-Joel undir Leitinum*

Hetta merkir at øll niðarahæddin "eystur" á 282m$^2$, í stóra avgreiðslubygninginum á Sjógøtu 2 mitt á Tvøroyri, verður at standa tóm eftir 1. juni 2022. Kommunustjórin metur, at hetta er spill av góðum og kostnaðarmiklum ferðmetrum. Her er talan er um ein stóran avgreiðslubygningur, ið lúkar øll krøv um atkomu fyri rørslutarnað og sum hevur góð parkeringsviðurskiftir.

Kommunustjórin mælir Tvøroyrar býráð til at viðgerða og taka støðu til eina langsiktaða loysn, hvat fyrv. Postabygningurin á Sjógøtu 2, sum kommunan hevur keypt í 2018 kann og skal brúkast til.

Eitt uppskot til loysn, sum Tvøroyrar býráð verður mælt at taka støðu til er, hvørt bygningurin kann hýsa Kunningarstovu og partar av avgreiðsluni hjá Tvøroyrar kommunu, sum halda til í býráðsskrivstovuni á Tvøravegi 37.

Umstøðurnar at parkera kring býráðsskrivstovuna eru ikki góðar og fólk, ið eru rørslutarnað hava ikki nøktandi atkomu til býráðsskrivstovuna og kunningarstovuna sum er. Harumframt liggja hesar avgreiðslur ikki sjónligar á Tvøravegi 37, sum er ein tíðandi fyrimunur hjá Kunningarstovuni.

Mett verður, at omanfyri viðurskiftir kunna vera loyst, um Kunningarstovan og partar av umsitingini flyta í fyrv. Postabygningin, ið er bygdur sum avgreiðslubygning.

**Býráðið 30. marts 2022:**
Kristin Michelsen mælir til at hølini, sum Posta nú hevur uppsagt, verður tørvsmett í Trivnaðar– og umhvørvisnevndina, sum ger nýtt tilmælið til fíggjarnevndina.

22/22
**22/00190-2 IRF -Ársaðalfundur 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.03.2022 | 22/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 29.03.2022**
Umsitingin hevur móttikið bræv frá IRF, sum kallar inn til Ársaðalfund:
Fríggjadagin, 29. apríl kl. 10.30 á Hotel Føroyum.

Limakommunurnar eru umboðara av øll býráðslimum til aðalfundin, har hvør kommuna, undirskrivar fulltrúarváttan til býráðslim við atkvøðurættisambært viðtøkum felagsins 12. grein, 5. stk., ið skal sendast aftur til skrivstovu felagsins áðrenn aðalfundin.

Heitt verður á luttakarar um at fráboða luttøku í góðari tíð og verður døgurði verður eftir fundin.

**Dagsskrá sambært 7. grein í viðtøkum felagsins:**

1. Framløga av virki felagsins í farna roknskaparári
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar
3. Val av grannskoðara, ið skal vera ríkisviðurkendur
4. Framløga av broyttari fíggjarætlan fyri 2022 og fíggjarætlan fyri 2023 til góðkenningar
    4.1. Frágreiðing um íløguætlanina fyri 2022 og 2023
5. Framløga um kunningar- og samskiftisarbeiði hjá IRF
6. Mál, sum nevndin ella lutaeigararnir vilja hava til viðgerðar

**Viðlagt er:**

- Fulltrúarváttan at fylla út, og sum sambært viðtøkum felagsins 12. grein, 5. stk., skal sendast aftur til skrivstovu felagsins áðrenn aðalfundin
- Prentað ársfrásøgn fyri 2021
- Broytt fíggjarætlan fyri 2022
- Fíggjarætlan fyri 2023
- Uppskot um limagjald fyri 2023
- Uppskot um íløguætlan fyri 2022 - 2023
- Samanbering av rakstrinum fyri 2021, broyttari fíggjarætlan fyri 2022 og fíggjarætlan fyri 2023
- IRF viðtøkur

**Til samtyktar:** Fulltrúarváttan til býráðslim at atkvøða á ársaðalfundinum hjá IRF
Aðalfundurin.

Viðtøkur fyri IRF:

- *Grein 7. Aðalfundurin, har allir lutaeigararnir eiga rætt at møta, er evsta vald í felagnum. Tað er ikki loyvt at geva øðrum lutaeigara fulltrú at møta sína vegna.*
- *12. grein. Áðrenn aðalfundin, sendir hvør lutaeigari fulltrúarváttan til felagsins skrivstovu, har sagt verður frá hvør umboðar limin. Orðstýrarin kannar eftir, at møtt er smb. fulltrúarváttaninar.*

Umboð fyri lutapartin hjá Tvøroyrar kommunu í IRF er Anita Vibergsdóttir, fast umboð, Kristin Michelsen,varaumboð.

Alvi Mortensen, er valdur nevndarlimur í IRF, umboðandi Suðuroy.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til kunning og støðutakan.

**Býráðið 30. marts 2022:**
Kristin Michelsen mælir til at Anita Vibergsdóttir fær fulltrúarváttan at atkvøða á aðalfundinum í IRF vegna Tvøroyrar kommunu. Einmælt samtykt.

**23/22**

[redacted]

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 08.02.2022 | 2/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.03.2022 | 31/22 |
| 3 Býráðið | 30.03.2022 | 23/22 |

[redacted]

[redacted]

[redacted]

[redacted]

[redacted]

[redacted]

[redacted]

[redacted]

[redacted]

[redacted]

Til kunningar

## 6/22
## 22/00096-1 Skattatøl 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2022 | 2/22 |
| 2 Býráðið | 22.02.2022 | 5/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2022 | 3/22 |
| 4 Býráðið | 30.03.2022 | 6/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.02.2022**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2021/2022

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2022/23**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður við hesum kunning um skattainntøkur latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til umrøðu/-støðutakan.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 22. februar 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 30. marts 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

**7/22**
**22/00124-2 Tvøroyrar skjalasavn -fyrisp. um hølið til starvsfólk (Konservator)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 08.03.2022 | 14/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.03.2022 | 25/22 |
| 3 Býráðið | 30.03.2022 | 7/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.03.2022**
Avtala er, at leiðarin av Skjalasavninum Kári Jespersen møtir á fundinum at greiða frá ætlanum at víðkað um virksemið.

**Lógargrundarlag: Kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 08. marts 2022:**
Kári Jespersen var møttur á fundin at greiða frá Føroya Skjalasavni.
Einmælt samtykt, at gamla skrivstovan á Ísverkinum, sum í dag verður brúkt til tónleikarúm hjá ungdóminum, framyvir verður avsett til arbeiðsrúm til konservator. Tvøroyrar kommuna ber kostnaðin av at dagføra skrivstovu til konservator, og innrætting av skrivstovu til konservator verður fíggja av FÆ2022§609 «Skjalasavn» har avsett eru tkr. 400. Einmælt samtykt.

**Kommunustjórin 10.03.2022**
Neyðugt er við eykajáttan til §609, «Skjalasavnið», at dagføra skrivstovu til Konservator.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2022:**
Einmælt samtykt at veita játtan á kr. 50.000,- av §115 «Húsið hjá Hanneba»

**Býráðið 30. marts 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**8/22**
**22/00174-2 SALT -áheita á nevndina fyri Saltsilogrunnin at viðka stýrið til 5 limir**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.03.2022 | 8/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 22.03.2022**
Umsitingin hevur hin 21.03.2022 móttikið teldupost frá stjóranum í Mentanarhúsinum SALT á Drelnes, við avriti av skriv, sum er dagf. 15. mars, og sent til UMMR við áheitan á Landstýrismannin í Mentamálaráðum, um at góðkennan viðtøkubroytingina, sum stýrið fyri Saltsilogrunnin hevur samtykt;
**At nevndin verður víðkað úr trimum til fimm limir.**

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um stuðul til Saltsilogrunnin og Viðtøkur fyri Saltsilogrunnin. *§ 3. Landsstýrismaðurin skal góðkenna broytingar í viðtøkunum fyri Saltsilogrunnin.*

**Fíggjarligar avleiðingar:** Ongar

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til kunning og støðutakan.

**Býráðið 30. marts 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**9/22**

[redacted]

| | | |
|---|---|---|
| [redacted] | [redacted] | [redacted] |
| [redacted] | [redacted] | [redacted] |

[redacted]

[redacted]

[redacted]

[redacted]

[redacted]

[redacted]

[redacted]

[redacted]

[redacted]

[redacted]

[Gem]

**10/22**

[redacted]

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| [redacted] | | [redacted] | | [redacted] | |
| [redacted] | | [redacted] | | [redacted] | |
| [redacted] | | [redacted] | | [redacted] | |

[redacted]

[redacted]

[redacted]
Ut i naturen – Sherpa. dei som byggjer stiane våre – NRK TV

[redacted]

[redacted]

[redacted]

[Gem]

Fundurin lokin kl. 20:00

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen